– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Dámlig hús í Børkugøtu

**Húsini, sum eru sjarmerandi, hugnalig og livilig, standa væl fyri í Havn.**









## Fyrsta fatanin

Fyrsta fatanin er, at talan er um eini sera hugnalig hús, sum eru væl hildin. Húsini standa í friðarligum umhvørvi við blindan veg. Frálíkt útsýni er av loftinum yvir býin og fjørðin, og garður / urtagarður er uttanum. Dagstovnar, býlignshús, sparkivøllur og busssamband er nær við.

## Ljós og luft – stílur og snið

Húsini eru væl bygd, og innan eru tey sett í stand og dagførd við lættari hond, so upprunadygdin er varveitt, og tá ið tú kemur inn, kennir tú hugnaliga huglagið. Litirnir eru ljósir, gongin er opin og nosslig, og haðani kemur tú inn í køkin og hugnaliga alrúmið við fløvandi brenniovni til køldu tíðina. Gólvini eru pussað og lútað, so rái og rustikki dámurin kemur fram. Húsini eru forskotin, og trin er millum hæddirnar. Sjónvarpsstova er á ovastu hædd, og haðani er sera gott útsýni yvir býin.

## Niðasta hæddin

Í niðastu hædd er góð sjálvstøðug íbúð við egnari inngongd. Íbúðin er livilig og hugnalig. Inngongd er eisini til stórt fýrrúm / kjallararúm, ið er væl nýtiligt til mangt og mikið.

## Innan

Í miðhæddini er inngongd, gongd, bryggers / vaskirúm, hjallur, køkur / alrúm / borðsstova, stova, baðirúm, hjúnarrúm við útgongd til garðin. Í ovastu hædd er trappugongd / alrúm / stova, 2 kømur og sjónvarpsstova / hugnastova / arbeiðsrúm. Í niðastu hædd er inngongd, gongd / bryggers / vaskirúm, fýrrúm / kjallararúm og sjálvstøðug íbúð. Har er gongd, køkur / stova, kamar og baðirúm.

## Fakta

**Adressa** ........... Børkugøta 17, Tórshavn
**Byggiár** ............ 1983
**Hæddir** ............. 3
**Gólvvídd** ........... 280 $m^2$ búøki
**Grundøki** .......... 542 $m^2$
**Hjallur** .............. Ja
**Prísuppskot** .... kr. 2.500.000,00









PF inni
Niels Finsensgøta 37
Postboks 364
FO-110 Tórshavn
Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**